# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Europa avgerð í hesum skeiði

Vitjan uttanríkisráðharrans var sera áhugaverd, og mørk vórðu flutt í málinum um marknaðartilknýti Føroya. Neyvan heilt av tilvild fall almannakunngerðin av niðurstøðum Spiermans saman við vitjanini hjá Per Stig Møller. Spiermann tók ein part av myndini frá báðum uttanríkisráðharrum. Taka vit Spierman fyrst, so sigur hann ikki annað enn tað, føroyskir løgfrøðiligir serfrøðingar hava sagt leingi, nevniliga, at okkara uttanríkispolitisku viðurskifti, snúgva seg meira um politikk enn um løgfrøði. Hetta merkir, at tað, sum løgfrøðingar hjá donsku stjórnini í dag meta sum stríðandi móti ríkisins felags grundlóg, ber til at fremja um fimm ella tíggju ár.

Hetta er sostatt meira politikkur enn jura og hjá tí, sum hevur fylgt við felags donsk-føroysku søguni seinastu fimti árini, gongur sjón fyri søgn. Besta dømið er undirgrundarmálið. Hetta merkir í stuttum, at er politiskur vilji í danskari stjórn at ganga føroyskum ynskjum á møti, ja, so verður okkum gingið á móti. Hetta er ein tilgongd, sum tekur tíð, men tilgongdin endar vanliga, at føroyingar fáa sín vilja so ella so. Ein kann so gita um donsk motiv, men tað er ikki so áhugavert, tað hevur helst okkurt við ríkisfelagsskapin at gera, og tá er einhvør donsk stjórn til reiðar at lata jura víkja fyri politikki. Hetta var tað Atli Dam, sáli, skilti og tvíhelt um, og fastatøkur hansara tryggjaðu Føroyum við góðari hjálp frá framúrskarandi føroyskum løgfrøðingum og ráðgevum, rættin til undirgrundina. Tað, sum tá, bert fá ár frammanundan, varð hildið løgfrøðiliga púra ógjørligt, var, tá samanum kom, politiskt møguligt.

Á tíðindafundinum í gjár hjá báðum uttanríkisráðharrum var júst henda søguliga tulking, at tað ber til at fáa ta skipan, ið vit ynskja, havd á lofti. Eisini her gekk sjón fyri søgn. Tá Per Stig Møller varð konfronteraður við hesi sjónarmið, so var svar hansara, at vóru hesi sjónarmið á borðinum, so fór stjórnin sjalvsagt at kanna tey og fyrihalda seg til teirra. Hetta eru nýggir tónar og ráðharrin, sum sjálvsagt fammanundan hevur kent til sjónarmiðini, var týðuliga fyrireikaður til spurningin og svar hansara var tað, ið føroyingar ynsktu at hoyra. Var stjórnin ikki sinnað at flyta seg, so hevði danski uttanríkisráðharrin uttan víðari og blankt víst hesum møguleikum aftur. Tað tykist sostatt, sum allar fortreytir nú eru til staðar fyri, at Føroyar kunnu fáa tað marknaðartilknýti til Europa, sum vit ynskja. So nú mugu og skulu vit gera upp við okkum sjálvi og finna út av, hvat tað er, ið vit vilja við Europapolitikkinum. Skulu vit fylgja EFTA kósini? Skulu vit so ella so fara beinleiðis upp í ES? Skulu vit bert royna at fáa eina nógv betri fríhandilsavtalu við ES, sum í roynd og veru er ein EBS skipan, ella skulu vit royna eitthvørt heilt fjórða ella fimta? Tað er hetta ein sokallað skjóttarbeiðandi nevnd skal gera tilmæli um. Vit hava drálað alt ov leingi við avgerð í hesum máli, so nevndin má skunda sær, so vit kunnu fáa eina avgerð í hesum valskeiði.

**Sosialurin**

## Fullveldishallið 500-700 mill kr. árliga

**MARJUS DAM**
Løgtingsmaður



Loysnin: Tann frægasti hátturin at minka hallið, hevði verið at hækka ríkisveitingina aftur til støðið í 2001 og prístalsregulera hesa. Tí orsøkin til hallið er skerjanin av veitingini! Eisini er neyðugt at tryggja at henda veiting fer til tænastur, ið hon er ætlað til.

Um ríkisveitingin skuldi verið skerd, kundi leisturin, ið er avtalaður í samgonguskjalinum verið nýttur.

Tað hevði, saman við góðari búskaparstýring, tryggjað vælferðarsamfelagið Føroyar.

**Neyvan nakar føroyingur ivast í, at størsta orsøkin til hallið á fíggjarlógini uppá 500-700 milliónir árliga er fullveldispolitikkurin - í serliga H. Hoydal er pápi at.**

**Ongin umbering**.

Men enn havi eg tíverri ikki sæð ella hoyrt hann biðið Føroya Fólk um umbering fyri hallið. Tvørturímóti so rennur hann undan allari ábyrgd. Samstundis sum øll onnur og serliga Sambandsflokkurin fáa ákoyringarnar

**Ósannindi**

Í eini grein av H:H. um at ”blokkurin blokerar ábyrgd” herfyri, er at kalla ongin setningur sannur. Greinin er, frá enda til annan, ein roynd at renna undan ábyrgd. Sambært Høgna Hoydal so eru øll frambrot í Føroyum hend orsaka av, at hann sat í landstýrinum frá 1998 til 2003. Og smb. honum, so er høvuðsorsøkin til fíggjarligu trupulleikarnar í Føroyum serliga ein skattalætti, ið varð givin av ABC samgonguni, ið kostaði minst 372 milliónir krónur(smb H.H.). Men sera undarligt, at H. Hoydal ikki nevnir, at fullveldissamgongan eisini gav skattalættar, ið sjálvandi eisini ”kostaðu”- um ein skal nýta tað orðavalið. Men tað hevur hann kanska ”gloymt”

Allir búskaparfrøðingar eg havi tosa við siga, at tað var rætt at geva skattalættan hjá ABC tey fyrstu árini, meira ivasamt við 4. árinum.

Eitt annað, sum undrar er, at hesar 372 milliónirnar í skattalætta, ið oyðileggja so nógv smb HH, liggja mistonkiliga tætt við tær 366,4 milliónir krónurnar árliga í fullveldissamgongan framdi í høvdaleysum blokkniðurskurði.

Hvussu góður blokkniðurskurðurin var, tað síggja øll nú. Kanska sær formaður Tjóðveldi tað eisini. Eitt hall uppá 500 – 700 milliónir krónur á fíggjarlógini í ár.

**Sannleikin:**

Høgni Hoydal heldur fram í sínum loysingarrúsi at tosa um enn meira blokkniðurskurð. Umleið 1000 milliónir skulu úr føroyskum búskapi árliga afturat.

Um hallið á fíggjarlógini gerst minni av teirri orsøk munnu tey flestu, sum duga at rokna, hava eina meining um.

Loysingin er um at forkoma okkara vælferðarsamfelagi. Spurningurin nú er, hvussu vit fáa loyst trupulleikarnar, ið loysingin hevur skapt, uttan at oyðileggja okkara vælferðarsamfelag.

Skulu vit hækka skattir og avgjøld. Vit hava ídag eitt av heimsins hægstu skatta og avgjaldstrýstum.

Skal skerjast innan tað almenna – og hvar. Sannleikin er, at innan almenna økið í Føroyum er í flestum føri neyðugt við betri tænastum – og tað plagar at kosta meira.

**Loysnin:**

Tað frægasta at gjørt var at hækka ríkisveitingina aftur og prístalsregulera hesa. Eisini at tryggja at henda veiting fór til tær tænastur, ið hon er ætla til.

## Sparing eftir r...

**MICHAEL DALBØ**
Norðskáli

Nú frættist, at SpariRósan av álvara er farin at gera um seg innan trivnaðarøkið, og at tornirnar í fyrsta umfari fara skræðandi og oyðileggjandi eftir Sambýlinum í Pætursgøtu.

Her gekk ein og helt, at »ejendommens ret er ukrænkelig«, men sjálvandi er hettar jú ikki galdandi fyri Sambýlir og líknandi stovnar, ið jú eru pengur beint út av kassanum.

Hetta eru jú bara nøkur menniskju, ið av náði frá tí almenna, búgva til leigu í nøkrum tilvildarligum sethúsum, og sum jú skulu finna seg í teimum lótum og ólótum, ið vit sokallaðu normalu tíma at bjóða teimum.

Ein kann ikki lata verða við at hugsa, um vit munnu verða á veg inn í eina skiljiskipan, har ið fyrsta og annað floks borgarar blíva skildir sundur og viðfarnir hareftir.

Vóni, at tit fólkavaldu eru greið yvir, at tað eru sárbarar mannalagnur, ið tit hava liggjandi í tykkara kabalu, og at tit seta serstovnaøkið, og starvsfólkið, ið har starvast, fleiri ljósár aftur í tíðina, vit teimum sokallaðu sparingum, ið tit ganda runt við.

Tey avvarðandi tími eg slettis ikki at nevna; tey hava, eftir øllum at døma, stríðst til fánýtis fyri tey, ið ikki orka at stríðast sjálvi.

Og hvat hundan, tað er jú passaliga lang tíð til næsta val, og tá hava fólk nokk gloymt, at tað var ein hending við nøkrum snedigum fólkum uppi í Hoyvíkshaganum, ið blivu grýtt út úr tí, ið tey hildu verða sítt heim, men sum tíverri bert vísti seg at verða eitt hús í einum Matadorspæli. Í Matador kann ein, sum øllum kunnugt, jú handla og manerera, sum einum lystir, uttan, at tað fær nakrar serligar avleiðingar.

**E.S.**

Bleyt virðir; tey veiku í samfelagaðnum; fata morgana.

Sigst, at vit øll eru líka fyri lógini, men summi eru nú einaferð meira líka enn onnur; eisini í 2009.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.